# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg havi ikki sagt, at Barrack Obama er óskikkaður til forsetaembætið. Grundlógin avger, hvør er skikkaður*

*Bill Clinton*



*Illveður og óvanliga nógv regn hava gjørt stóran skaða á grøðina í Norðurkorea*
*Mynd: Polfoto*

# Hungursneyð hóttir Norðurkorea

**Illveður og óvanliga nógv regn hevur oyðilagt ein stóran part av grøðini í Norðurkorea, og hjálparfelagsskapir ávara nú um vandan fyri hungursneyð**

Almenna norðurkoreanska tíðindastovan KCNA skrivaði í gjár, at tað regnaði óvanliga illa nógvastaðni í landinum seinasta vikuskiftið og mánadagin. Serliga nógv regn er komið niður í Kangwoon-landspartinum. Í veruleikanum hevur tað verið samregn har alla ta seinastu vikuna, og sambært KCNA hava veðurmenninir mált avfallið til 322 millimetrar í Kangwoon hesa vikuna.

KCNA sigur, at tað nógva avfallið hevur gjørt landbúnaðinum ómetaliga stóran skaða, og at tað bøtir ikki um livikorini hjá fólkinum, sum er vánalig frammanundan. Norðmaðurin Terje Lysholm, sum er samskipari hjá Reyða Krossi í Norðurkorea, sigur við NTB, at norðurkoreanar hava ikki loyst trupulleikarnar av vatnflóðini, sum herjaði landið í fjør, og sum var tann ringasta í 30 ár. Terje Lysholm sigur við norsku tíðindastovuna NTB, at er vandi fyri matvørukreppu í Norðurkorea í næstum.

## Stórur tørvur

Norðurkorea megnar ikki at útvega fólkinum, sum telur 23 milliónir, nóg mikið til matna. Fyrr fekk landið mat og aðrar neyðsynjarvørur úr Sovjetsamveldinum, og í seinastuni hevur grannalandið Suðurkorea sent rís norður um markið. Men sambært ST er støðan kortini álvarssom, og serliga illa stendur til í landnyrðingspartinum av landinum.

- Støðan er sera álvarssom, og tað eru fólk, sum líða, sigur Jean-Pierre de Margerie hjá ST-matvørustovninum WFP. Fyri nøkrum døgum síðani bað WFP altjóða samfelagið um einar 100 milliónir krónur, so stovnurin kann víðka síni hjálpartiltøk í Norðurkorea.

Sambært WFP hava umleið 6,4 milliónir ov lítið til matna.

# Russland svarar aftur

**Russland hóttir nú við at svara aftur, um Pólland loyvir amerikanarum at seta partar av rakettverjuskipanini upp har**

Russland fer ikki at sita hendur í favn, um polsku myndugleikarnir fara at loyva amerikanarum at seta partar av teirri ætlaðu rakettverjuskipanini upp á polskari jørð.

- Tað kann koma upp á tal at seta Iskander-rakettir upp í Hvítarusslandi og at lata stríðsflogfør hava støð har og í Kaliningrad, sigur russiski sendiharrin í Hvítarusslandi, Aleksandr Surikov, við tíðindastovuna Interfax.

USA hevur ætlanir um at seta tíggju rakettstøðir upp í Póllandi, og tær eru ætlaðar at skjóta álopsrakettir hjá fíggindum niður. Men russar meta rakettirnar sum eina hóttan, og russisku myndugleikarnir hava sagt, at teir fara at koma við einum hóskandi svari, um amerikanararnir gera álvara av ætlanini at seta rakettirnar upp í Póllandi.

Aleksandr Surikov sigur við Interfax, at Russland fer ikki at seta kjarnorkuvápn upp í Hvítarusslandi, men at Russland fer at útbyggja sítt hernaðarliga virksemi í Hvítarusslandi.

Hvítarussland er granni hjá Póllandi og Litava, og bæði londini eru partar av amerikonsku rakettverjuætlanunum.

## STUTT SAGT

### 63 ár síðani Hiroshima

Í gjár varð skipað fyri minningarhaldi í japanska býnum Hiroshima í sambandi við, at 63 ár vóru liðin, síðnai amerikanarar sleptu einari kjartnorkubumbu niður yvir býin. Hetta var fyrstu ferð, at kjarnorkuvápn blivu brúkt, og bumban, sum hevði fingið navnið "Lítli drongurin", kravdi 140.000 mannalív. Tríggjar dagar seinni sleptu amerikanarar einari kjarnorkububumbu afturat. Hon bleiv slept niður yvir japanska býin Nagasaki, har umleið 80.000 fólk doyðu.
Á hvørjum ári leuta fólk úr fleiri londum til Hiroshima og Nagasaki at minnast tey bæði álopini í tøgn. Herumframt verður skipað fyri minningarhaldi víða um heimin sum eitt nú í Reykjavík, har minningarhald var í gjárkvøldið.



### Bilvirkir í kreppu

Tríggjar av teimum størstu bilverksmiðjunum í USA, Ford, Chrysler og General Motors, eru komnar í álvarssamar trupulleikar, tí fólk keypa færri bilar, og tað kann hava við sær, at verkmsiðjurnar fara á húsagang, skrivar AP. Sagt verður, at amerikanararnir venda sær frá teimum bilunum, sum brenna nógv, og tað hevur gjørt, at verksmiðjurnar hava stórt hall í rakstrinum, sigur CNN Money. Eitt nú hevði General Motors 15 milliardir dollarar í halli í 2. ársfjórðingi, hallið hjá Ford var 8,7 milliardir dollarar, og Chrysler hevur ikki almannakunngjørt sín rokskap enn. Hagtølini vísa eisini gongdina. Tey siga, at bilasølan minkaði 13 prosent í juni, og so stórt hevur fallið ikki verið tey seinastu 16 árini.




*General Motors hevur stórt hall*
*Mynd: DR*